Aksel V. Johannesen **Nr. 84/2019**
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir tingskipanini § 52a
Fyrispurningur um meirviðisgjaldið av talgildum tænastum, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a).

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvussu nógvar útlendskar fyritøkur, ið selja talgildar tænastur, so sum tónleikastroyming, sjónvarps- og filmsstroyming, spøl, appir og forrit til føroyskar brúkarar, eru meirvirðisgjaldsskrásettar í Føroyum?
2. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvussu nógvar útlendskar fyritøkur veita omanfyrinevndu tænastur til føroyingar og selja fyri eina upphædd omanfyri 50.000 krónur um árið?
3. Kann landsstýrismaðurin vátta, hvørt føroyskir brúkarar rinda avgjøld, tá ið teir keypa forrit, spøl ella rinda haldaragjald fyri talgildar tænastur, uttan mun til um fyritøkurnar eru MVG-skrásettar í Føroyum ella ikki?
4. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvussu nógvan pening føroyskir brúkarar hava rindað í avgjøldum fyri omanfyrinevndu tænasturnar í tíðarskeiðinum 2015-2020?
5. Kann landsstýrismaðurin greiða frá, um pengarnir, sum føroyskir brúkarar hava rindað í avgjøldum fyri umrøddu tænastur, eru komnir í landskassan, sum teir sambært lógini eiga?
6. Um pengarnir ikki eru komnir í landskassan, kann landsstýrismaðurin so upplýsa, hvar teir eru endaðir?
7. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at seta tiltøk í verk, soleiðis at pengarnir, um teir ikki koma í landskassan sum er, koma í landskassan í framtíðini?
8. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at royna at krevja inn tann pening, sum møguliga – og um so er av órøttum – er farin av landinum?

Viðmerkingar:
Sambært frágreiðing, sum fólkatingsmaður Javnaðarfloksins legði fram í apríl, rinda føroyingar avgjøld fyri at brúka talgildar tænastur frá útlendskum fyritøkum, hóast hesar ikki eru MVG-skrásettar í Føroyum. Talan kann sambært frágreiðingini vera um 13,5 milliónir krónur um árið, ið føroyingar rinda í avgjøldum, og sum landskassin síðani eigur at fáa endurrindað. Men sambært frágreiðingini koma hesir pengar ikki har, teir sambært lógini skulu – nevniliga í landskassan.

Hetta er ikki nakað nýtt mál. Sambært frágreiðingini gjørdi TAKS longu í 2015 vart við trupulleikan, men einki er hent síðani. Tað nýggja er, at vit hava fingið eina meting av, hvussu nógvar pengar, talan er um.

Seinnu árini eru alsamt fleiri tænastur vorðnar tøkar á netinum, og bara undir Covid-19 kreppuni hevur verið ein ógvusligur vøkstur av brúkarum, sum halda stroymingartænastur. Upphæddin, sum føroyingar rinda í avgjøldum fyri hesar tænasturnar, er allarhelst eisini í stórum vøkstri, og tí er hon helst størri í dag, enn mett verður í frágreiðingini.

Hetta er kortini ikki bara ein fíggjarligur trupulleiki, men eisini ein spurningur um, hvørt landsins lógir verða hildnar ella ikki. Hesar upphæddir høvdu komið væl við í føroyska landskassanum, har tær av røttum hoyra heima, heldur enn í onkrum útlendskum kassa, har tær ikki hoyra heima sambært lógini. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 13. mai 2020

Aksel V. Johannesen